# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at góði pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Andrias Nielsen**

andaðist á Sýnini leygardagin 31. oktober, 90 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju týsdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Ninna, Tóra og Jóanis**

Tey, ið ynskja at minnast Andrias, kunnu lata eina gávu til Sandavágs kirkju

# MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 7. nov. fyllur Óli Johansen, vanliga nevndur Suðringurin. Føðingardagurin verður hildin í heiminum Sjógøta 135, Tvøroyri. Opið hús frá kl. 13-20.

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 2. nov. verður Maria Magnussen við Eirikstoftir í Miðvági 80 ár. Opið hús er heima hjá Mariu og Jóhan mánadagin frá kl. 14 og úteftir, og eru øll hjartaliga vælkomin at heilsa uppá Mariu.

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 4. nov. verður Arna Dalbø Hansen, Svínáir, 80 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 7. nov. frá kl. 12 til kl. 15.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. nov. verður Sámal Christiansen, vanliga nevndur Sámal hjá Barbu, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum leygardagin 7. nov. Opið hús er frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. nov. verður Hildigarð Hansen, Syðrugøtu, 90 ár. Dagurin verður hildin í Gøtubrá frá kl. 19. Øll eru vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. nov. hava Óluva og Jónfríður Nielsen, Saltangará, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen (Stina og Dia av Syðradali), gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 8. nov. kunnu hjúnini Herborg og Hildibjart Johansen, Tórshavn, halda gullbrúdleyp. Tey ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin til eina hugnaliga løtu í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøta 9 frá kl. 12 til 17.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

# Absalon Hansen fimmti



Sunnudagin 1. november fylti Absalon Hansen í Havn fimmti. Absalon er føddur og uppvaksin á Toftum. Eftir loknan barnaskúla fór hann inn á Glyvrar at ganga í realskúla, og síðani fór hann til Havnar. Lærdi til bankamann í Sjóvinnubankanum og arbeiddi har mong ár.

Gavst síðani og fór at røkta bóndagarðin í Toftahaga í Hósvík. Áseyðatalið liggur um 130. Hann gongur á fjall alt heystið, ikki bara í Hósvík, men eisini aðrastaðni, eitt nú inni í Dølum í Vestmanna og í Hvalvík. Hann hevur fleiri vælvandar seyðahundar og er nógv eftirspurdur, tá ið fjallgongurnar koma.

Tað er serliga innan ítrótt, at vit kenna Absalon. Sum ungur var hann góður fótbóltsspælari og vann tvær ferðir FM-heitið við B68. Absalon er fjøltáttaður ítróttarmaður og hevur til dømis vunnið FM í talvi við Tofta Talvfelag og FM í 100 km. súkkling.

Tíðliga áttatiárini var Absalon á ítróttarháskúla í Århus. Har byrjaði hann at renna. Helt fram, tá ið hann kom aftur til Føroya og var sostatt ein av okkara allarfyrstu rennarum. Rann hálvt maraton á oyggjaleikum á Ile of Man í 1985 og somuleiðis á Guernsey 1987. Tá ið Føroyar vóru vertir í 1989, vann Absalon gull á fulla maratonteininum við tíðini 2t. 35m. Framman-undan hevði hann runnið fleiri maraton í Danmark og í Týsklandi. Skjótasta tíðin, 2t. 27m., er framvegis føroysk met. Hann eigur eisini metið á hálvum maratoni, ið er 1t. 9m. 45s. Tað setti hann í Odense fyri meira enn tjúgu árum síðani.

Absalon hevur gott til at bregða. Pápi hansara, Harry Hansen á Toftum, hevur runnið nógv ár, og hóast 70 ára gamal rann hann fulla teinin á Tórshavn Marathon í fjør og fekk silvurheiðursmerki í bólkinum supervet-eranar. Í ár rann Harry hálva teinin, 21,1 km.

Longu tá ið Absalon vandi til oyggjaleikir í Føroyum, fór skaði at gera vart við seg, og hesin hevur verið ringur at sloppið av við. Tíbetur hevur Absalon verið við aftur til rennikappingar seinastu árini.

Um Absalon er í stuttum at siga, at hann er heilur, har sum hann er, og tá ið hann samstundis setir sær stór krøv, endar hann ofta á ovastu rók. Hann er góður fotografur, framúr bogaskjútti, og tá ið hundakappingar og seyðasýningar eru, kom nógv steyp til høldar.

Ingibjørg og Absalon búgva í hugnaligum siglingarumhvørvi nærindis Müllers Pakkhúsi. Tey eru gestablíð, og har hevur tú mangan sitið væl. Húsini laðaði kendi grótlaðarin Jákup Andreas Arge (Jampan) í sínari tíð.

Vit í Bragdinum fara at ynskja Absalon hjartaliga tillukku við runda degnum og vóna at síggja hann til nógv rennikappingar komandi árini.

**Óli**

# Minningarorð um lítla Jákup

*ov tíðliga komst tú í henda heim og ov tíðliga fórst tú hagar frá mammusa elskaði skattur*
*17 dagar vit fingu her og ov skjótt teir fóru.*
*Harrin styrki og ugga gev*
*mammu systrum og pápa*
*at vit teg aftur skullu sjá*
*í himmal landinum góða*
*sov søtt mín elskaði skattur*

*takk fyri lánta tíð sum var merkt av gleði og sorg*
*tú altíð verður við mammusa hjartað.*

**heilsan mamma**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ása Udbø, úr Havn**, fer til gravar frá Frelsunarherinum týsdagin 3. november kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Ásu við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata Frelsunarherinum í Havn eina peningagávu, konta í peningastovnunum

## Dagurin

2. november. Alla sálna dagur. Umleið ár 1.000 kemur í tann siður at halda minningarorð fyri øll, sum farin vóru, og ikki bara fyri halgimennini.
*Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008*

# Yvir 4000 skógvaeskjur



Í ár komu 4060 skógvaeskjur inn til Christmas Child-tiltakið í Føroyum. Sunnudagin 25. oktober var seinasta freist at lata skógvaeskjur inn til Christmas Child-tiltakið. Eskjurnar vórðu pakkaðar hjá Faroe Ship, og tilsamans 4060 skógvaeskjur vórðu sendar av landinum í mun til 3300 eskjur í fjør. Í ár verða eskjurnar latnar til børn í Rumenia.

Umleið 50 áhugabólkar kring landið hava verið við til at savna inn skógvaeskjur til tiltakið bæði samkomur, kirkjur, skúlar og onnur. Til dømis var Tilhaldið í Tórsgøtu eisini við í tiltakinum.

Tá eskjurnar koma fram, verða tær í samstarvi við kirkjur, samkomur, skúlar og vælgerandi felagsskapir á staðnum latnar børnum á sjúkrahúsum, barnaheimum, flóttafólkalegum, býlum fyri heimleys og í fátækrabýlingum.

Fyrireikararnir av Christmas Child tiltakinum fegnast um góðu undirtøkuna og ynskja at takka øllum sum hava stuðla á ymiskan hátt.